# VARPIÐ

Canal+Film1 • Hósdagin kl. 19.00

## The Road to Guantanamo

**Á hesysti 2001 fóru fýra ungir muslimar úr Stórabretlandi fyri at taka lut í eini brúðarveitslu í Pakistan. Ferðin endaði við, at tríggir teirra vórðu tiknir til fanga av amerikonskum herdeildum – og sendir til loyniligu leguna á Guantanamo, har teir í tvey ár vórðu afturhildnir og píndir.**



DR2 • Fríggjadagin kl. 23.20

## Imagining Argentina

Leikstjórin Carlos og blaðkvinnan Cecilie liva saman við dóttrini Teresa í einum Argentina – anno 1976 - sum er lammað í ræðslu um hernaðarveldið. Eitt einaveldi, sum burturflytur mótstøðufólk síni, sum síðani hvørva. Tá Cecilie skrivar um nøkur horvin skúlabørn, hvørvur hon brádliga sjálv, og Carlos vil gera alt, til tess at finna hana, áðrenn tað er ov seint.



TV3 • Leygardagin kl. 22.30

## Face of a Killer

Carlos – sjakalurin – er kaldasti drápsmaðurin, sum heimurin enn hevur sæð. Bæði Ísraelittar og amerikumenn hava leitað eftir honum í 20 ár uttan úrslit. Tá besti fregnartænastumaðurin hjá CIA finna útav, at Annibal Ramirez kann hjálpa teimum í leitanini, fara teir av álvara ígongd. Fyrst skal Ramirez tó venjast, so hann "verður" Carlos. Fyri at fanga ein slíkan drápsmann, mást tú nevnliga eisini duga at hugsa sum ein slíkur.


Televarpið

Fleiri rásir - einki roks


Sosialurin


FRÍGGJADAGUR 4. MAI 2007


Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið